Kunngerðablaðið A

2026 Givið út 28. november 2026

Nr. 112 27. november 2026

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin)
(Flyta innkrevjing, ábyrgd og málsviðgerð av heilsutrygdargjaldi til TAKS at umsita)

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1

Í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 29. mai 2024, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 24, stk. 2, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Tá ið umsøkjarin ikki longur rindar heilsutrygdargjald í øðrum Norðurlandi, hevur hann skyldu at boða TAKS frá hesum."

2. § 24, stk. 3, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"TAKS rindar kostnaðin av hesum."

3. Í § 24 verður sum stk. 6 sett:
"*Stk. 6*. Ásetingarnar í §§ 8 og 9 í løgtingslógini um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi eru samsvarandi galdandi fyri at áseta, broyta ella taka upp aftur gjald til heilsutrygd."

4. § 26, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Til nýtslu í sambandi við umsókn um gjaldsundantøku sambært § 24, stk. 2, kann TAKS útvega sær upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum."

5. § 26, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2*. Hevur persónur givið TAKS skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri gjaldsundantøku sambært § 24, stk. 2, kann TAKS eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið viðkomandi av órottum ikki hevur goldið."

6. Sum yvirskrift yvir § 28 verður sett:

"*Revsiáseting*"

7. § 28 verður orðað soleiðis:

"**§ 28.** Um ikki hægri revsing er ásett eftir aðrari lóg, verður tann revsaður við sekt, sum letur TAKS skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella ikki letur upplýsingar sambært § 26."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd.

Í Tinganesi, 27. november 2026

Beinir Johannesen (sign.)
løgmaður

Lm. nr. 38/2026